# Kvinnudagshald í Mettustovu

**Havi ongantíð verið á einum kvinnufundi í Mettustovu áður. Um eg skal vera heilt erlig, má eg viðganga, at eg havi hildið kvinnufelagið verið sum ein bindiklubba av reyðsokkum, sum tóku synd í sær sjálvum og prátaðu um, hvussu óreinir menn eru. Eg fór so dyggiliga skeiv. Hetta var bæði áhugavert og læruríkt. Og avgjørt vert at mæla øðrum konufólki til**



*Millum luttakararnar var eisini Heidi Peteresen, løgtingskvinna, sum settu veruliga gongd á orðadráttin við síni gjøgnumgongd av málsetningunum í javnstøðulógini*

*Mynd Eydna Skaale*

HUGLEIÐING
*Eydna Skaale*

Klokkan er júst farin av átta, tá eg parkeri mær bilin úti á Reyni. Gangi tey fáu fetini niðan í Mettustovu, meðan eg royni at ímynda mær hvat fer fram eitt sovorði kvøld. Veit, at eg eri eitt sindur ov sein, men kanska eg fái okkurt burturúr kortini.

Tá eg tríni inn, hava tær akkurát ein nátturðasteðg. Eini 40-50 kvinnur í øllum aldri og úr øllum samfelagsstættum eru samankomnar. Politikarar, lærarar og heimagangandi. Prátið gongur so lystiligt og av og á skolar láturin um alt rúmið. Eg fái at vita, at Kinna Poulsen hevur hugleitt um kvinnur og list, og at tað er spell, at eg ikki hoyrdi tað, tí tað var óalmindiliga gott. Nakar sita úti í gongini og roykja, men tá Bergtóra Hanusardóttir ringir við eini ringiklokku, koma tær kvikliga inn og seta seg. Prátið heldur uppat og andlitsbragdini gerast álvarsamari.

### Eingin broyting í tinginum í 25 ár

Karin Kjølbro, fyrrverandi løgtingskvinna, fær orðið. Hon tosar um hvat er hent í javnstøðu- og kvinnumálum gjøgnum árini. Og hon veit hvat hon tosar um. Í 1979 var hon, saman við Jonu Henriksen, nevniliga fyrsta kvinnan á tingið. Hon fortelur um tógva stríðið um javnstøðulógina og um alt rumblið, sum hevur staðist av hesi góðu lóg. Um sprongdar samgongur og illvilja ímóti javnstøðuni. Allatíðina koma viðmerkingar frá teimum eldru, sum eru gamlar í garði og sum minnast umrøddu hendingar. Av og á eru yngri kvinnur, sum seta spurningar.

Eg haldi hetta vera sera áhugavert, tí hetta er ikki nakað alment kent, í øllum førum ikki í mínum aldursbólki. Hvussu nógva tíð og orku hesar kvinnurnar hava brúkt uppá hesi ymsu málini og hvussu nógv tung tøk tær hava tikið fyri at fáa kvinnuna virðismetta. Nógv av tí, sum eg haldi vera púrasta sjálvfylgiligt, hava hesar kvinnurnar barst fyri. T.d. tað, at eg fái somu løn, sum mínir mannligu starvsfelagar. Men eftir teimum eldru at døma, er enn langt eftir á mál. Tað boðar teirra ristan við høvdinum frá.

– Í 1979, áðrenn nakra javnstøðulóg ella javnstøðunevnd, vóru vit tvær kvinnur valdar inn á ting. Í dag, 25 ár seinni, eru tær tíðanverri framvegis bara tvær, staðfestir Karin Kjølbro at enda.

### Stór javnstøðu-ráðstevna í mei

Síðani reisir Annika W. Joensen, forkvinna í javnstøðunevndini, seg. Hon greiðir frá eini javnstøðuráðstevnu sum er sett at verða 10 mei, í samband við at 10 ár eru liðin síðani javnstøðulógin varð sett í gildið. Greitt verður frá skránni, har kend nøvn koma at halda fyrilestrar t.d. íslendska Vígdis Finnbogadóttir og víðafarna Durita Holm.

Í einum horni verður brádliga eitt øgiligt suss og at enda reisir ein seg upp og spyr Anniku, um ikki javnstøðunevndin átti at verið eitt sindur meiri sjónlig. Um ikki fleiri tiltøk áttu at verið sett í verk fyri at kunna fólk um, hvat veruliga stendur í javnstøðulógini.

Søkki sjálv spakuliga niður í stólin, av ótta fyri, at onkur skal varnast, at eg faktiskt ikki veit heilt nágreinilga hvat stendur í javnstøðulógini. Kenni brádliga eina øgiliga skomm, ikki at vita nakað um tað, sum hesar kvinnurnar hava nýtt meginpartin av sínum lívi at berjast fyri. Seti knyklar í brýr og royni sum frægast at nikka sannførandi, meðan eg seti mær fyri at finna javnstøðulógina -og lesa hana, áðrenn eg fari til songar í kvøld.

### Hvat er nátt í 10 ár?

Næsta at taka orðið er Heidi Petersen, løgtingskvinna. Hennara evnið er gjøgnumgongd av javnstøðulógini -hvat er nátt og hvat vantar enn. Hon heldur, at hóast talið av tingkvinnum er tað sama sum fyri 25 árum síðani, so er nógv nátt allíkavæl. Viðvíkjandi møguleikum til útbúgving er í dag javnt millum konufólk og mannfólk. Tað eru enntá fleiri gentur á miðnámsskúlunum enn tað eru dreingir, og tað man fara at síggjast aftur um nøkur ár, heldur hon. Tá tað kemur til kvinnulig leiðarastørv er støðan eisini nógv batnað síðstu árini. Í dag síggjast fleiri kvinnuligir stjórar, deildarleiðarar o.s.fr. Á einum øki haltar tó enn, og tað er innan undirvísingartilfar. Meginparturin av skúlabókunum eru skrivaðar av monnum um menn til menn og dreingir at lesa. Her verður tó talað at, og sagt, at so galið er tað heldur ikki. Tað eru lærararnir, sum velja undirvísingartilfarið, og tað er tí upp til teir, hvørji evni verða tikin upp í skúlanum.

Hetta setir veruliga ferð á kjakið og viðmerkingarnar eru nógvar. Til tíðir stuttligar, til tíðir speiskar. Skulu dreingir og gentur hava somu viðfer ella skulu vit veruliga undirstrika at kynini ikki eru eins? Hava dagstovnar og skúlar ábyrgdina av stóru gjónni millum kynini? Er tað genetiskt ella er tað kanska uppalingin, sum ávirkar mest? Og hví eru konufólk so hervilig at kúga hvørt annað? Her koma ymsu útgangsstøðini hjá ættarliðunum greitt til sjóndar. Nakrar, serliga tær eldru, tosa út frá kvinnusakini, meðan aðrar tosa út frá javnstøðuni. Og her er veruliga stórur munur á sjónarmiðunum. Skal denturin leggjast á kvinnuna einsamalla ella á kvinnuna javntsetta við mannin?

Kjakið er ornað nú, og tað er farið at knýpa at lata bert eina hava orðið í senn. Decibellini hækka rættiliga skjótt og at enda tekur Bergtóra Hanusardóttir ringiklokkuna aftur. Tá nøkulunda friður er fallin, skjýtur hon upp at hava ein lítlan steðg, áðrenn farið verður undir síðsta evnið. Klokkan er longu blivin hálvgum ellivu, og onkrar eru farnar at geispa.

### Kvinnuhandil

Tær eru nógvar, sum nýta høvið at sleppa sær til hús í steðginum. Tað merkist, at tað er við at verða seint og bert eini 20-25 kvinnur sita eftir, tá ringt verður aftur við orðstýrara klokkuni. Men so skjótt byrjað verður aftur, kemur lív í aftur. Tosað verður um kvinnuhandil, prostitutión og striptease. Í hesum málunum eru ikki tær stóru ósemjurnar; allar eru samdar um at nógv mál eru, sum okkurt má gerast við.

Tosað verður um lýsingina í Dimmalætting herfyri, sum bjóðaði kvinnur fyri eitt ávíst gjald og um viðgerðina hetta málið fekk í tinginum. Vaksandi talið av útlendskum damum, sum gifta seg til Føroya verður eisini umrøtt, og Elin Plank frá kvinnuhúsinum greiðir frá, at tað árliga eru fleiri av hesum tilflytarunum, sum søkja sær hjálp í kvinnuhúsinum, tí tær ikki hava tað gott hjá føroyska manninum. Okkurt má gerast fyri at hjálpa hesum kvinnunum at fóta sær í føroyska samfelagnum. Kjakið gongur aftur um hvat kundi og átti at verið gjørt. Klokkan er brádliga farin av ellivu og Bergtóra ringir við klokkuni fyri seinastu ferð. Nakrar reisast beinanvegin og skunda sær út í myrkrið, aðrar geva sær betri stundir og práta víðari.

Sjálv gangi eg spakuliga millum gomlu, tættbygdu húsini á Reyni á veg oman til bilin aftur. Kvøldið varð als ikki sum eg væntaði. Her vóru harðar og kontantar meiningar, samkensla og látur. Hetta vóru ikki kvinnur, ið sótu hjálparsleysar og tóku synd í sær sjálvum, men kvinnur við árræði, visiónum og ikki minst vilja til at broyta og bøta. Eitt stak hugnaligt kvøld, má eg siga. Avgjørt vert at endurtaka og at mæla øðrum til, sum hava bert eitt sindur av áhuga fyri samfelagnum.



*Nógvar kvinnur høvdu leitað sær oman í Mettustovu kvinnudagin. Bergtóra Hanusardóttir var orðstýrari í tí lívliga kjakinum*

*Mynd Eydna Skaale*



# 50 mill. kr. brúktar til førleikamenning

**- eftir eru 35 mill. kr.**

OLJUPENGAR OG FØRLEIKAMENNING
*Jan Müller*



*Petur Joensen í Oljufyrisitingini, sum øll hesi árini hevur tikið sær av spurningum í sambandi við játtan til førleikamenning*

Síðani loyvi vórðu latin til oljufeløg at leita eftir olju við Føroyar í ár 2000 hava feløgini latið umleið 50 mill. kr. til førleikamenning av ymsum slag, men her serliga til at menna vinnuna og ikki minst útbúgvingarverkið. Tá feløgini fingu leitiloyvi bundu tey seg eisini til at lata eina ávísa upphædd, sum skuldi fara til at gera okkum betri før fyri at vera við í eini oljuvinnumenning og at møta avbjóðingunum frá hesi nýggju vinnu. Samlaða upphæddin feløgini lótu var uppá umleið 85 mill. kr. Nú umleið fýra ár eru farin av loyvistíðini eru 35 mill. kr. eftir. Petur Joensen, sum umsitur førleikapengarnar á Oljufyrisitingini sigur við Sosialin, at høvuðsendamálið er, at pengarnir skulu fara til vinnuendamál tvs. bæði beinleiðis til vinnu og til vinnuligar útbúgvingar.

Nú uppgerð er gjørd yvir førleikamenningina, vísir tað seg, at eini 60% av pengunum eru farnir beinleiðis til vinnuna og eini 40% til útbúgvingarverkið. Taka vit útbúgvingarøkið, so er tað fyrst og fremst Fróðskaparsetrið, sum hevur fingið pengar til fleiri av sínum verkætlanum eitt nú PHD, útbúgving av oljuverkfrøðingum ol.

Tað er annars ymiskt, hvat feløgini leggja seg eftir, tá tey játta umsóknum. Eitt felag sum Statoil t.d. hevur í stóran mun lagt seg eftir at stuðla útbúgvingartiltøkum.

Hyggja vit so førleikamenning í vinnuni, so er kanska umleið ein helvt av førleikapengunum har farin til venjing og upplæring.

Nú Petur Joensen hevur umsitið førleikastuðulin øll hesi árini hevur hann bitið merki í, at "forsvinnandi" lítið er farið til leiðslumenning. –Hetta er kanska eitt sindur tankavekjandi at merkja sær. Ein skuldi trúð, at fleiri fyritøkur í landinum ynsktu at fáa styrk til at menna leiðslurnar, men so er ikki.

Annars vísir uppgerðin , at býtið millum stórar og minni verkætlanir, millum tær, sum geva úrslit her og nú og meira langsiktað er javnt, so alt í alt heldur Petur Joensen, at tað er ikki so galið.

Annars tykist áhugin fyri at søkja um førleikapengar at vera minkandi. Talið á umsóknum er fallandi og eisini hvussu viðkomandi hesar eru innan førleikamenning. Tí tykist tað at vera steðgað eitt sindur upp. Ein orsøk til tað kann vera, at orkan til at hugsa um menning kanska ikki er so nógv til steðar í løtuni.

Oljufyrisitingin sær annars ikki allar umsóknir, sum oljufeløgini fáa. Tær, sum enda á borðinum í Oljufyrisitingini, eru bara tær, sum oljufeløgini ætla at játta. Linjan er tann, at man letur pengar til tað, sum kann setast í samband við vinnuliga førleikamenning.

### Úrslitið

Hvat heldur Petur Joensen so um úrslitið av førleikamenningini. – Vit hava fingið upplæring á oljuøkinum og á nógvum øðrum økjum. Annars var útgangsstøðið at luttaka í oljuvinnuni gott, og tær føroysku fyritøkurnar, sum eru farnar uppí hesa vinnu, hava staðið seg væl sum heild. Spurningurin er so, hvussu vit koma víðari. Her er neyðugt, at føroysku fyritøkurnar gera sær greitt, at útlendsku feløgini seta krøv, og tað skal arbeiðast nógv fyri at fáa sáttmálar. Man má ikki rokna við at faa nakað sum helst serverað. Tað at oljuvinnan er komin inn um markið merkir ikki, at sáttmálarnir koma við av sær sjálvum.

Men tað liggur so eisini ein skylda á oljufeløgunum í sambandi við føroyska luttøku, og tað er at skapa samband millum føroyskar og útlendskar fyritøkur. Petur Joensen sigur, at tað er kanska eitt sindur ymiskt, hvussu tað er við tí, men samanumtikið hava tey flestu feløgini gjørt sína skyldur her.

Sum eitt feskt dømi um hetta nevnir Petur Joensen seinastu avtaluna, sum Atlantsflog hevur gjørt við norska fyritøku um flutningin av oljufólki. – Hetta er fyrst og fremst føroyska felagnum fyri at takka, men eg rokni við, at Statoil eigur sín part í hesum. Statoil eigur eitt herðaklapp fyri at hava livað upp til henda setningin í avtaluni millum føroyskar myndugleikar og oljufeløgini.

Uppá fyrispurning hvat hann heldur um tær atfinningar, sum hava verið frammi um, at pengarnir frá oljufeløgunum eisini áttu at verið latnir til mentan og gransking í størri mun sigur Petur Joensen, at vit mugu minnast til, at hetta er ein avtala millum landsstýrið og oljufeløgini. Oljufeløgini eru gingin við til at lata hesar pengarnar út frá tí fortreyt, at teir eru til vinnuna og at førleikamenna vinnuna. – Vit kunnu tí ikki bara siga, at nú vilja vit broyta praksis. Tí hetta eru ikki okkara pengar, men ein avtala er um, hvussu teir skulu brúkast.

Oljufyrisitingin og FOÍB, felagið hjá oljufeløgunum møttust annars í gjár at tosa um, hvussu farast skal fram á eitt nú førleikamennandi økinum, tá tað kemur til eitt nýtt útbjóðingarumfar, tvs. hvørjar tankar oljufeløgini hava gjørt sær um spurningin.



*Oljufeløgini hava eisini skyldu til at hjálpa til at fáa samstarv millum føroyskar og útlenskar fyrtøku. Gott dømi um hepna gongd í so máta er seinasta avtalan, sum Atlantsflog hevur gjørt við norskt felag. Her hevur so Statoil livað upp til sína skyldu heldur Petur Joensen*

## Oljupengar til golfundirvísing

Ein av seinastu játtanum av oljupengunum er farin til nakað, sum uttan iva fer at vekja "uppsikt" millum manna, og tað er ein verkætlan at útbúgva føroying til golfinstruktør. Tað eru BP og Amerada Hess, sum hava játtað pengar til hetta økið. Høvuðsendamálið er at umsita ein golfbana, tá tað kemur so langt. Petur Joensen vísir á, at tað í mongu førum verður tosað um, hvat er vinnuligt og ikki. Í hesum málinum var so m.a. eitt tilmæli frá Ferðaráðnum, sum segði, at tað hevur sera stóran týdning fyri ferðavinnuna, at man kann fáa eitt golfvirksemi upp at standa, sum hevur áhuga hjá ferðafólki.

*– Hvat sigur Petur Joensen til eina slíka játtan?*

– Fyri okkum er hetta ein líka góð vinna sum okkurt annað. Fyri tað at ein verkætlan kki hevur propell ella stert, so kann hon vera góð nokk. Oljufyristingin hevur tí givið hesi ætlan sítt viðmæli.

Í byrjanini vóru førleikapengarnir annars meira oyramerktir til oljuvinnu ella virksemi við tilknýti til hana. Hetta er so broytt við tíðini. M.a. tí at tað er eisini sera torført at siga júst, hvat oljuvinnan umfatar. Petur Joensen vísir á, at oljuvinnan hevur eisini eitt yvirornað mál, sum er at fáa meira vinnuligt virksemi í Føroyum. Tí vóru treytirnar fyri at fáa stuðul eisini víðkaðar nakað herfyri, tá landsstýrismaðurin gjørdi nakrar nýggjar leiðreglur, sum søgdu, at vinna sum heild kemur undir førleikamenningina. Talan er tí um fleiri projekt sum ikki beinleiðis hava nakað við oljuvinnu at gera, ið fáa stuðul. Her er stuðul til ein golfinstruktør eitt. Annað dømi, sum ilkki beinleiðis hevur við oljuvirksemi at gera, er t.d. stuðul sum eitt nú hevur Fiskirannsóknarstovan fingið.